

# Hvussu væl kennir tú Bibliuna?

## Jólakapping fyri børn upp til 17 ár

Nú jólini standa fyri durum, fara vit á Sosialinum undir eina kapping við spurningum til børn og ung upp til 17 ár um mangt og hvat í Gamla og Nýggja Testamenti.

Vit byrja í dag hósdag 4. desember við sjey spurningum. Teir skulu øll tit, ið vilja vera við í kappingini, klippa út, svara, skriva navn, bústað, tel. og aldur á, og goyma. Tað sama skulu tit gera við spurningarnar, vit hava til tykkara í hvørjum Sosiali til og við mikudag 17. desember, tá kappingin endar.

Allir spurningarnir í kappingini eru ikki líka lættir at svara. Tá kunnu tit til dømis fara í bíbliusøgurnar, tit lesa ella hava lisið í skúlanum at finna svarini. Ella hví ikki spyrja tey tilkomnu í húsinum! Í telduni ber eisini til at leita eftir svarum.

Leparnar, tit hava klipt út og goymt *(við spurningum, svarum, navnið, bústaði, tel. og aldri)* skulu tit senda Sosialinum í seinasta lagi leygardagin 20. desember. Í brævbjálvanum til okkara skal sama navn standa á øllum lepum. Uttaná skal standa "Jólakapping 2003", navn á luttakara og bústaður. Tit, ið tá hava sent allar lepar inn og svarað rætt, verða við í lutakasti um fýra virðislønir.

Við vón um undirtøku frá hópin av børnum og ungum um alt Føroya land, ynskja vit øllum ein góðan jólamánað.

HESTPRENT - TEL. 314 555

**1. Vinningur:**

**Vikuskiftisferð fyri tvey til Íslands**

ATLANTIC AIRWAYS



Blue Lagoon

VINNINGAR:




## Hvussu væl kennir tú bíbliuna?

*Spurningar úr Nýggja Testamenti*

| Spurningar | Tykkara svar |
|---|---|
| **64** Á odda fyri monnunum, sum tóku Jesus í urtagarðinum við Oljufjallið, var ein av lærusveinum hansara. Hvussu æt hann? | : |
| **65** Hvussu æt rómverski landshøvdingurin, sum var trekur at døma Jesus til deyða og vaskaði sær um hendurnar við hesum orðum: Eg eri ósekur í blóðinum á hesum rættvísa manni? | : |
| **66** Jesus opinberaði seg fleiri ferðir fyri lærusveinum sínum, eftir at hann var risin upp frá deyðum, eitt sinn í fylgi við tveimum av lærusveinunum. Hvussu æt staðið, teir vóru á ferð til? | : |
| **67** Í Apostlasøguni hoyra vit um fyrsta pínslaváttin, sum læt lív fyri Jesus Krist. Hvussu æt pínslaváttur in? | : |
| **68** Ein tann ítarsti at forfylgja teimum fyrstu kristnu var Paulus, sum seinni gjørdist ein sannur kristniboðari. Hann varð umvendur á veg til ein bý at føra tey kristnu har bundin til Jerusalem. Hvussu eitur tann býrurin? | : |
| **69** Paulus hevur skrivað trettan av brøvunum í N.Testamenti. Í einum av brøvum hansara finna vit fleiri vers um kærleikan, sum er langmóðigur, illskast ikki, øvundar ikki, søkir ikki sítt egna, tolir alt og ber alt, og av teimum trimum trúgv, vón og kærleika er kærleikin størstur. Hvussu eitur brævið, har hetta um kærleikan stendur? | : |
| **70** Hvussu eitur seinasta bókin í Bíbliuni? | : |

| Navn á luttakara: | Bústaður: |
|---|---|
| Telefon: | Aldur: |

At klippa út og goyma, til kappingin endar 20. desember. Seinasta freist at senda Sosialin allar útkliptu leparnar við spurningum og svarum, navni á luttakara, bústaði, tel. og aldri, er leygardagin 20. desember. Uttan á brævbjálvanum skal standa Jólakapping 2003, umframt navn á luttakara og bústaður. Minnist til, at allir lepar í brævbjálvanum frá hvørjum einstøkum luttakara, skulu hava sama navn.

Sosialurin
Postboks 76
FO-110 Tórshavn
Tel. 341 800 • Fax 341 801



**UTTAN ÚR HEIMI**

# So er tað bin Laden

**Saddam Hussein er tikin, men Osama bin Laden gongur framvegis leysur, og tað verður neyvan so lætt at fáa fatur á honum**

LEITING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Osama bin Laden verður ikki so léttur at finna sum Saddam Hussein. Serfrøðingar halda heldur ikki, at hann fer heldur ikki at lata seg taka á lívi, verður hann funnin*

*Mynd: Reuters*

Nú Saddam Hussein situr í fangabúri eina ella aðrastaðni, kunnu amerikanararnir aftur hugsa um at fáa fatur á leiðaranum í al-Qaeda, Osama bin Laden.

- Saddam er ikki nakar trupulleiki longur, so nú er tað bin Laden, vit hugsa um, sigur amerikanski sendiharrin í Afghanistan, Zalmy Khalizad, sum ikki ivast í, at bin Laden er á lívi.

Fleiri serfrøðingar halda, at bin Laden er ein nógv størri hóttan ímóti USA, enn Saddam Hussein var, áðrenn hann varð tikin seinasta vikuskiftið. Ein teirra er tann kendi yvirgangsserfrøðingurin Rohan Gunaratna, sum hevur skrivað eina bók um al-Qaeda.

- Størsti veikleikin hjá amerikanarunum eru tær miseydnaðu royndirnar at gera av við Osama bin Laden og Ayman al-Zawahiri, sum er næsti maður í al-Qaeda, sigur Rohan Gunaratna við Aftenposten.

Hann og aðrir serfrøðingar eru á einum máli um, at tað verður munandi truplari at fáa fatur á bin Laden enn at finna Saddam Hussein. Og orsøkin er munurin teirra millum.

- Saddam Hussein var ein harðrendur einaræðisharri, sum hevði nógvar fíggindar ímillum síni egnu, og sum vóru til reiðar at svíkja hann. Soleiðis er ikki við bin Laden. Hann fær stuðul frá sínum. Hann er sum ein fiskur ímillum aðrar fiskar, sum ikki gera honum ilt, sigur Hussain Haqqani á Carnegie Endowment í Washington.

Hann og Rohan Gunaratna ivast ikki í, at Osama bin Laden fjalir seg á marknaleiðunum millum Pakistan og Afghanistan. Har hevur hann hildið til í meiri enn tíggju ár, og fólk har stuðla honum. Amerikanararnir hava einki gjørt fyri fólkið har. Fyri teimum er bin Laden ein hetja, og tí verja tey hann, sigur Rohan Gunaratna.

# Eigur ikki at fáa deyðadóm

**ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, heldur ikki, at Saddam Hussein skal dømast til deyða. Amerikanararnir hava harafturímóti einki ímóti deyðarevsing**

REVSING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Hvørja revsing eigur Saddam Hussein at fáa, tá hann einaferð kemur fyri ein dómsatól?

Tann spurningurin hevur verið dúgliga umrøddur, síðani fyrrverandi einaræðisharrin varð tikin seinasta leygardag. Formaðurin í irakska stjórnarráðnum, Abdel Aziz al-Hakim, hevur sagt, at irakar skulu sjálvir avgera revsingina, og at talan kann verða um deyðadóm.

Amerikanska stjórnin segði longu mánadagin, at hon fer ikki at seta seg upp ímóti einum deyðadómi.

Men tað ger ST. Kofi Annan, aðalskrivari, sigur, at dómstólurin, sum skal døma Saddam Hussein, skal halda seg til altjóða reglur og grundleggjandi siðvenjur.

- ST-dómstólar hava ongantíð dømt nakran til deyða, og sum aðalskrivari fari eg heldur ikki at taka undir við, at tað verður gjørt í hesum førinum, sigur Kofi Annan. Hann hevur boðið irakum løgfrøðihjálp, hava teir tað fyri neyðini.

## Lóg skal tryggja fleiri kvinnur

Í næstum fer svenska stjórnin at leggja fram eitt lógaruppskot, sum skal tryggja, at kvinnurnar verða betur umboðaðar í partafelagsnevndum.

Eitt yvirlit yvir nevndirnar í teimum svensku partafeløgunum vísir, at bara seks prosent av nevndarlimunum eru kvinnur. Tað er alt ov lítið, sigur ráðharrin í javnstøðumálum, Mona Sahlin, og tí hevur hon nú boðað frá einum lógarinntrivi. Mona Sahlin sigur, at kunnu svensku partafeløgini ikki næsta ár vísa á, at fjórði hvør nevndarlimur er ein kvinna, verður kravið ásett við lóg.

Ætlandi kemur lógaruppskotið eina ferð næsta summar. Umframt sjálvt kravið um kvinnur í partafelagsnevndum fer lógin at áseta, hvussu feløg skulu revsast, halda tey ikki ásetingarnar.

## Undir illgruna fyri 40 morð

Løgreglan í statinum New Jersey í USA hevur illgruna um, at ein 43 ára gamal sjúkrarøktarfrøðingur hevur beint fyri næstan 40 sjúklingum tey seinastu sekstan árini.

Sjúkrarøktarfrøðingurin, sum eitur Charles Cullen, varð tikin seinasta fríggjadag og skuldsettur fyri at hava verið einum sjúklingi á sjúkrahúsinum Somerset Medical Center at bana. Løgreglan hevði eisini illgruna um, at hann hevði tikið lívið av einum øðrum sjúklingi, men nú er illgruni um, at hann kann hava dripið ímillum 30 og 40 djúklingar. 15 teirra skal hann hava dripið á Somerset Medical Center, og hini skal hann hava dripið á níggju sjúkrahúsum í statunum New Jersey og Pennsylvania.

Á fleiri sjúkrahúsum eru leiðslurnar nú farnar at kanna skjølini hjá fólki, sum doyðu, meðan tey vóru har. Á nøkrum av sjúkrahúsunum hava líkskoðanir avdúkað, at summi høvdu leivdir av ymsum heilivági í blóðinum, sum tey ikki áttu at havt.

## Forsetin sigur nei

Tað er ikki á hvørjum degi, at nakar dittar sær at mæla italska forsætisráðharranum, Silvio Berlusconi, ímóti, men tað ger italski forsetin nú.

Carlo Azeglio Ciampi, forseti, kunngjørdi mánadagin, at hann vil ikki staðfesta eina nýggja fjølmiðlalóg, sum tjóðartingið hevur samtykt, og hann hevur tí koyrt hana aftur í tingið til nýggja viðgerð. Tjóðartingið í Rom samtykti annars lógina tann 3. desember.

Nýggja lógin strikar eina reglu í verandi lóg, sum sigur, at eingin má eiga meiri enn tvær landsumfatandi útvarps- ella sjónvarpsrásir. Fjølmiðlafyritøkan hjá Silvio Berlusconi, Mediaset, hevur tríggjar landsumfatandi rásir, og sum forsætisráðharri hevur hann eisini óbeinleiðis eftirlitið við almenna út- og sjónvarpinum RAI. Tað er hetta, forsetin ikki vil góðtaka.

## Nógv ólógligt fílabein

Ein kanning hevur avdúkað, at tað finnast umleið fýra tons av ólógligum fílabeini á goymslu í teimum trimum vesturafrikonsku londunum Nigeria, Senegal og Fílabeinsstrondini. Nøgdin svarar til fílabeinið av umleið 760 fílum, og í hesum londunum eru bara umleið 550 livandi fílar.

Síðani 1990 hevur tað verið bannað at keypa og selja fílabein, men enn er lætt at fáa fatur á ólógligum fílabeini á marknaðunum í fleiri afrikonskum londum. Sambært kanningini eru tað serliga ferðafólk úr USA, Kina, Italia, Japan og Suðurkorea, sum keypa lutir úr fílabeini, hóast tað er ólógligt. Men almenn umboð so sum útlendskir diplomatar bróta eisini bannið, sigur kanningin.

Djóraverndarfelagsskapir krevja, at myndugleikarnir í teimum afrikonsku londunum leggja størri dent á at revsa tey, sum bróta bannið. Felagsskapirnir siga, at fílurin er hóttur nógvastaðni, og at hann er í vanda fyri at verða útruddaður summastaðni.